Vís hvør tú ert

Ta› er ikki altí› so lætt at vera ungur. Nógvir eru spurningarnir, sum stinga seg upp, og ikki er altí› so lætt at fáa eitt svar uppá hesar spurningar.
Yngd hevur finagi› eitt prát vi› Hera Kragesteen, sálarfrø›ing, um nakrar av hesum stóru spurningum

Mynd: Jens Kristian Vang

Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur heldur, at vit eiga ikki at smæ›ast burtur. Vís hinvegin hvør tú ert

"At turde er at miste fodfæstet et kort øjeblik.
Ikke at turde er at miste livet."

Søren Kierkegaard

Jákup Bogi Joensen

Ta› er ikki altí› so lætt at vera ungur. Serliga ikki í tí tí›ini vit liva í í dag. Men ráki› millum ung er solei›is í dag, at skalt tú vera partur av tí felagsskapi sum kallast ungdómur, krevst, at tú í so stóran mun sum gjørligt gerst ta› sum hoyrir ungdóminum til. Og ta› er júst her, at nógvir av trupulleikunum vi› at vera ungur í dag stinga seg upp. Vit lata okkum, kanska ótilvita›, í ov stóran mun st‡ra av ø›rum. Ta› hevur jú stóran t‡dning, hvat onnur halda og meina um okkum. Men eitt og hvørt val hevur nakrar fylgjur. Og í hesum føri kunnu fylgjurnar vera, at vit ótilvita›i gera ta›, sum fleirtali› ger. Sjálvt um hetta kanska ikki hevur so stóran t‡dning fyri okkum sjálvi. Kanska eru ta› onnur vir›i, sum hava størri t‡dning fyri okkum, enn júst tey øll onnur halda hava t‡dning. Men ta› krevur naka› av einum sjálvum at standa uttan fyri slíkan felagsskap. Sjálvsálit, vilji og áræ›i eru nøkur av lyklaor›unum í hesum sambandi.

Ta› ræ›ur um at finna seg sjálvan, og spurningurin kann ofta standa ósvara›ur. Hvør eri eg?

Fyri gó›ari viku sí›ani fekk Yngd eitt prát vi› Hera Kragesteen, sálarfrø›ing, sum hevur gjørt sær nakrar tankar hesum vi›víkjandi.

Vit eru øll gó› nokk

Vit kenna øll til ta›. At kenna seg einsamallan og vir›isleysan. Men okkum n‡tist ikki at stúra. Tí sjálvt um alt kann kennast heldur vónleyst til tí›ir, so sta›festir Heri Kragesteen, at øll eru vit gó› til okkurt og duga ta› væl.

Ta› ræ›ur um at hava sjálvsálit og trúgva uppá seg sjálvan.

Men hvussu kunnu vit byggja okkum eitt gott sjálvsálit og eina sunna sjálvsvir›ing upp?

- Her hava foreldur eina stóra uppgávu. Ta› hevur ótrúliga stóran t‡dning, at tú frá heilt ungum kennir og fær at vita, at tú ert gó›/ur nokk. Tá eitt barn kennir seg elska› og fær umsorgan, so fær ta› eina sunna sjálvsvir›ing. Foreldur og børn ella ung, kunnu saktans hava ymiskar meiningar um tingini, men ta› vil ikki siga ta› sama sum, at man ikki er gó›ur vi› hvønn annan.

Ta› hevur tí stóran t‡dning, at vit frá heilt ungum fáa at vita, at vit hava vir›i›, bara tí at vit eru til.

Vit eiga at vera elska›i fyri tann vit eru, og ikki fyri ta› vit gera.

Sjálvsálit er gott at hava. Ta› kunnu vit øll vera samd um. Men ta› er ikki altí› so lætt at byggja upp eitt gott sjálvsálit.

Men Heri Kragesten heldur, at ta› er at leypa út í ta›.

- Ta› krevur nógv av einum sjálvum, men eg haldi, at ta› er sera umrá›andi at koma fram vi› sínum tonkum og meiningum.

Ta› er eisini av stórum t‡dningi at læra seg, at ta› onnur halda og meina um ein, er naka› tey halda. Lær teg at skyna ímillum hvat er títt og hvat er teirra.

- Ta› ger onki um tú "kiksar" vi›hvørt, tí ta› ber nevnliga væl til at læra naka› n‡tt og spennandi um seg sjálvan, tá ein møtir mótgangi. Kanska er ta› sunt at "kiksa" í eitt longri tí›arskei›.

Heri Kragesteen vísir á, at ta› er gott at vera fyrireika›ur uppá, at ein avvísing ikki n‡tist at merkja, at tú ver›ur avvístur eina a›ru fer›.
Hann tekur í hesum sambandi eitt dømi sum forelskilsi.

- Ta› n‡tist ikki, um nú vi›komandi tú ert forelska›ur í velur onkran annan, at vera naka› gali› vi› tær. Als ikki.

Vi› hesum vísir Heri á, at ta› er av stórum t‡dningi, at man ikki tekur ein ósigur so nær og sigur, at so dugi eg ikki til naka› sum helst. Tvørturímóti.

Ta› er bara at herja á, heldur Heri.

Viljin og áræ›i nógv at siga

Ta› er onki at taka seg aftur í, at ta› krevur bæ›i vilja og áræ›i til at klára slíkar uppgávur. Men ta› letur seg væl ger. Arbei›ir man mi›víst vi› sær sjálvum og gerst meira tilvita›ur, so sæst ta› aftur.

Men hvat hava vilji og áræ›i at siga fyri okkum?

- Viljin og áræ›i hava ófatiliga nógv at siga. Ta› eru hesi bæ›i, sum í nógvum førum bera okkum fram móti teimum málum vit hava sett okkum fyri.

Ein av okkara kendastu listarmonnum, Kári P, seg›i ta› so rámandi í eini av yrkingum sínum. Meirlutin ræ›ur, syngur Kári. Júst her ste›gar Heri á.

- Ta› kann gott vera at meirlutin ræ›ur, men ta› vil ikki siga, at ta› er ney›ugt at finna seg í tí. Og ta› krevur í hvussu so er vilja og áræ›i at ganga ímóti meirilutanum og á sínar egnu lei›ir.

Ta› kann vera sera strævi› at standa uttan fyri, men gev ikki upp. Ger ta› tú meinar er rætt fyri teg.

Heri vísir tó á, at ta› er ikki altí› so lætt, tí man sum oftast er ógvuliga sárbarir í ungdómsárunum. Men ta› er ikki at missa móti, men hinvegin at dríva á.

Minni tilvita›i enn onnur

Yngd ditta›i sær at spyrja Hera Kragesteen, um hann heldur at føroyskur ungdómur kanska er minni› tilvita›ur enn ungdómur í okkara grannalondum. Og her er Heri sera varin vi› at koma vi› einum svari.

Men hann metir kortini solei›is um stø›una.

- Vit eru ikki komin líka langt inn í n‡ggju øldina sum tey í grannalondum okkara. Vit eru meira traditiónsbundin bæ›i í samband vi› uppaling og í a›rar mátar, og hetta ger, at vit kanska taka ta› meira róligt vi› øllum tí n‡ggja sum er uppi í tí›ini í dag.

Kanska er ta› júst hetta, sum ger, at vit hava trupulleikar vi› at seta okkum langtí›armál og tí virka› minni tilvita›i enn onnur rundan um okkum.

Og júst ta› at seta sær mál er eitt av teimum evnum, sum Heri sær sum eitt spennandi evni.

Men hevur ta› t‡dning, at vit seta okkum mál at arbei›a fram ímóti?

- Ja, ta› hevur stóran t‡dning. Setur man sær ikki mál, so er vandin stórur fyri, at tú livir lívi› rættiliga nógv minni tilvita› enn onnur.
Men ta› hevur nógv at siga, at tú setir tær realistisk mál. Og ta› kann vera trupult, tí her ræ›ur nevnliga um ikki at seta sær ov stór mál fyri, men heldur ikki ov smá.

Ver teg sjálvan

Ta› er ongin loyna, at nógv ungfólk hava stórar trupulleikar vi› at fara út í naka› sum er ókent og fremmant. Ta› kann vera í samband vi› skúlagongd, arbei›i, ella kanska forelskilsi.

Hvussu kunnu vit læra okkum at fara út í ta› ókenda?

- Hattar var ein torførur spurningur, men eg haldi at vit í slíkum førum ver›a noydd at vá›a. Tú mást tora at vera teg sjálvan og vísa hvør tú ert.

Ta› er ræ›andi, men ta› kann saktans vendast til ta› positiva og gerast til naka› spennandi og mennandi.

Ver ikki bangin fyri at dumma teg. Tann sum ikki hevur dumma seg hevur gjørt ov líti›. Kanska tú júst tá finnur svari› uppá spurningin:
Hvør eri eg?